gult cyan magenta svart



# Føroyar stóðu fyri besta avrikinum

*Útlendsku fjølmiðlarnir halda tað vera eitt bragd, at føroyska landsliðið kláraði javnleik ímóti Slovenia*



Útlendskir fjølmiðlar halda, at tað var ein sensatión, at føroyska landsliðið kláraði at javna leiðsluna hjá slovenum sunnudagin.

*Mynd: Álvur Haraldsen*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tíðindi úr fótbóltheiminum frættast skjótt kring Europa, og ikki minst, tá talan er um óvæntað úrslit í landsdystum.

Soleiðis var eisini sunnudagin - 10 ár eftir minniliga sigurin á Eysturríki - tá Føroyar á merkisverdan hátt høvdu klárað javnleik ímóti Slovenia. Tað gekk ikki long tí áðrenn útlendskir fjølmiðlar kundu bera boðini um javnleikin.

Danska Ekstrablaðið segði sunnukvøldið í eini yvirskrift, at tað var „Chockstart af Færøerne“, og teir halda als ikki, at tað var so løgið, at Føroyar spældu so væl ímóti Danmark.

Ritzau skrivaði: „Der udbrød folkefest på Færøerne søndag, da den færøske landsholdspiller Ossur Hansen i det sidste minut hamrede et frispark i målet forbi den slovenske målmand Marko Simeunovic. Med scoringen klarede Færøerne overraskende 2-2 hjemme mod Slovenien i en kvalifikationskamp til VM i fodbold.“

Ritzau slær eisini fast, at tað finnast ikki longur lættir dystir í altjóða fótbólti.

**Eitt bragd**

Íslendska Morgunblaðið kallar føroyska úrslitið óvæntað, meðan norðmenn taka ógvusligari til. Verdens Gang skrivar, at tað var eitt bragd, at føroyingar kláraðu at javna leiðsluna hjá slovenum eftir fáum minuttum.

„Det er øyboernes største bragd siden den historiske 1-0-seieren mot Østerrike for ti år siden,“ skrivar VG.

Blaðið heldur fram: „12, september 1990 vant Færøyene sin aller første kvalifiseringskamp mot et østerriksk lag som kom rett fra VM-sluttspill, selv om de måtte spille «hjemmekampen» i svenske Landskrona. Jubileet feiret de ved å stoppe de et slovensk lag som var med i sommerens EM-sluttspill.“

**Størstu hetjurnar**

Danska Berlingske Tidende heldur, at tað føroyska avrikið var tað besta í landsdystunum um vikuskiftið:

„Endnu et godt resultat af landstræner Allan Simonsens tropper, der endte med at blive de største helte af alle i weekendens europæiske kvalifikationskampe,“ skrivar blaðið.

Sviiar halda, at tað var ein sensatión, at føroyingar megnaðu at koma afturíaftur, eftir at hava verið aftanfyri 2-0.

„Resultatet är en av Färöarnas största skrällar genom tiderna. Den största kom när lilleputtnationen besegrade Österrike i Landskrona 1990 i kvalet till EM-slutspelet i Sverige 1992. I det senaste EM-kvalet spelade Färöarna också 1-1 hemma mot Skottland. Den här poängen var dock en större prestation,“ skrivar svenska blaðið.

# Kæran frá B36 varð avvíst

*Kappingarnevndin hevur gjørt av at avvísa kæruni hjá B36 um dystin, B36, B71*

JÁKUP MØRK

Fyrr í vikuni skrivaðu vit, at B36 hevði kravt, at dysturin móti B71 (B71 vann 4-2) skuldi leikast av nýggjum.

Orsøkin til hetta var, at dómarin, meðan støðan framvegis var 2-2, hevði gjørt eitt somikið álvarsligt mistak, at tey í B36 mettu hetta hava ávirkan á dystin.

Kappingarnevndin vísir í avgerð síni til grein 9 í »Reglur fyri dómsnevndir inna ÍSF og veriðgerð av kærum«. Í hesi verður skrivað:

»Sersambond, deildir ella dómsnevndin kunnu gera úrskurð viðvíkjandi øllum virksemi og leiki innan sersambandið/deildina, íroknað tulking av lógum og samtyktum, frátikið tó:
1. At strika meistaraheiti
2. At broyta meting dómarans í kapping
3. Dómararns góðkenning ella ikki góðkenning av kappingarvøllu og umstøðum«

Tað er petti 2 í hesum, sum kappignarnevndin hevur hildið seg til, og metir nevndin seg við hesum ikki hava heimild til at gera nakað sum helst við dómarans avgerð, og er málið avvíst við teirri grundgevin.

**B36 kærir**

Kristian á Neystabø, formaður í B36, var sum so ikki bilsin um úrslitið av viðgerðini hjá kappingarnevndini.

- Kappingarnevndin hevur sum so ikki møguleika at viðgera kæruna, og hetta vóru vit greiðir um frammanundan. Málið hoyrir heima í dómsnevndini, tí talan er um prinsippmál, sigur formaðurin hjá árstalsfelagnum. Víðari segði han, at einasta orsøk til, at málið fyrst varð beint í kappingarnevndina. Eisini vísir hann á, at tað málið í Danmark, sum B3,6 vísti á í kæru síni, eisini endaði í dómsnevndini.

Sostatt fer málið nú víðari í dómsnevndina, og eins og væntað, er seinasta orðið ikki sagt enn. Tað hevði tað neyvan heldur verið, um B36 hevði viðhald frá kappingarnevndini.

# Evstamark og dómaraseðlar

*Nýtt evstamark hjá ítróttinum og enn ein áheitan til feløgini um at senda okkum dómaraseðlarnar*

Tær broytingar, sum hava verið á Sosialinum seinastu tíðina í sambandi við prenting o.a., merkjast nú eisini á ítróttarblaðnum.

Størsta broytingin er tann, at evstamarkið hjá ítróttinum nú er flutt fram, soleiðis at alt innsent tilfar skal vera okkum í hendi sunnukvøldið.

**Dómaraseðlarnir**

Í hesum sambandi fara vit eisini enn einaferð at heita á tey ymsu fótbóltsfeløgini kring landið um at senda okkum dómaraseðlarnar frá dystunum í 1. og 2. deild hjá monnum skjótast gjørligt. Saman við Dimmalætting sendu vit eina tílíka áheitan út til feløgini longu undan kappingarbyrjan, men tíverri tykist tað ikki, sum um feløgini – við B71 sum einum einstakum undantaki – hava tikið hesa áheitanina til eftirtektar.

Tað er ikki løtuverk at gera fótbóltshagtøl, men vit halda, at tey eru neyðug fyri at umrøðan av føroyska fótbóltinum skal vera so fullfíggjað sum gjørligt, og tað man eisini hava áhuga hjá teimum, ið varða av fótbóltinum her á landi. Onkuntíð tykist tað tó sum um feløgini ikki eru serliga áhugað í hesum.

Ítróttarblaðstjórnin

teldupostur:
jakup@sosialurin.fo

telefaks: 31 47 20



## Viðmerking:




# Grind í Húsavík

Tjaldrið fann eina grind eystur úr Skálhøvda seinnapartin í gjár, og hon varð hildin til í Húsavík í gjárkvøldið

Umleið 50 hvalir vórðu merktir í grindini, sum legði beinini um sjey tíðina í gjárkvøldið, sigur løgreglan í Havn. Teir vóru á góð trý hundrað skinn, og tey vóru býtt í heimapartar og drápspartar.

Tað var Tjaldrið, sum fann grindina um tvey tíðina seinnapartin í gjár. Tá lá hon einar sjey fjórðingar úr Skálhøvda. Grindin varð rikin inn á Húsavík, har hon var hildin til í gjárkvøldið.

Sum skilst gekk drápið av tí besta.

# Danir sýta okkum tjóðskapin

Tað er fongur í fólki, sum hugsar og torir at siga sína hugsan, tí uttan tey doyr demokratiið. Eitt av hesum fólkum var Sigurð Joensen sáli. Í 1976 segði hann í eini røðu: „Harraguð, danir hava tann alrastørsta áhuga av at prógva, at teir einsamallir í allari verðini, eftir at sjálvt Portugal hevur givið upp – eru menn fyri at halda tveimum kolonium, Grønlandi og Føroyum. At hetta kemst av, at her stendur tað mest undirbrotliga, kúgaða, av monopolhandli og misskiltari religión spilta lítla fólk yvir fyri tí mest arroganta, av gomlum einaveldi og imperialismu komplett avstumpaða fólki, dønum, ja tað sigi eg“.

Hetta vóru hørð orð, tað visti Sigurð, tí málbar hann seg, sum hann gjørdi. Men hygg nú, hvat hendir. Í vikuni, sum fór, fingu vit váttað, at danir - sjálvt um teir væl vita, hvat ið landsstýri og 3 av hvørjum 4 føroyingum halda um heimastýrislógina - beint ímóti tilráðing landstýrisins, hava staðfest heimastýrislógina í evropeiska sáttmálanum um minnilutamál og økismál. Teir hava við hesum givið føroyskum støðu sum minnilutamál í einum millumtjóða sáttmála. Hetta er fúl imperialisma, einki annað. Eg vóni, at landsstýrið fer at mótmæla, so tað hoyrist í altjóðasamfelagnum. Tað skylda vit teimum, sum bardust fyri málinum.

At so onkur sambandsmaður, sum ikki kennir málsøguna, í Dimmu hevur róst hesum danska bragdi, vísir okkum bara, at søgan endurtekur seg. Her er eingin munur á muruni, nú og fyri 100 árum síðani. Betur hevði sømt seg at at rópt: „Vaknið føroyingar, tí nú er ovboðið“.

Eitt annað mál hesa vikuna snúði seg um eitt ógvuliga fólkaligt bræv, sum ein embætismaður vegna løgmansskrivstovuna hevur sent altjóða felagsskapinum ST. Danski uttanríkisráðharrin er ikki blíður. Í einum brævi til løgmann (23.08.2000) hartar hann landsstýrið: „Færøerne er en del af det danske kongerige, men har et vidtgående selvstyre med beføjelser hvad angår regulering af Færøernes indre anliggender. Hjemmestyret har ingen kompetence til at optræde på det folkeretlige plan, med mindre dette er bemyndiget af regeringen i overensstemmelse med hjemmestyreloven af 1948 og inden for rammerne af grundloven“.

Danski háskúlamaðurin Poul Erik Søe fylgir væl við og hann leggur ikki fingrarnar ímillum. Í grein í www.enmandsavisen.dk 26. august skrivar hann: „Helveg Petersen nu koloniherre over Færøerne. Nødvendigt med højesteretsdom om Færøernes stilling i riget efter udenrigsministerens indgreb mod færingernes demokratisk valgte regering i FN“. Og seinni: „Færøernes regeringschef, valgt af et lovligt flertal i et lovligt parlament, har end ikke ret til at stille FN et spørgsmål. Udenrigsministeren har stoppet den færøske henvendelse. Med eet slag er Færøerne gjort til en koloni, skønt Danmark netop med den gældende grundlov fra 1953 prøvede at komme ud af sin stilling som koloniherre. Niels Helveg Petersen har gjort sig til koloniherre i Atlanten“. Og seinni skrivar hann hetta: „Henvendelsen skyldes selvsagt, at den danske statsminister, der har Færøerne som sagområde i sit ministerium, har gjort sig til bydreng for mindretallet i det færøske lagting, hvor hans egne socialdemokratiske fæller hører til. Hver time af regeringens levetid er den danske regering afhængig af netop de færøske socialdemokrater, for uden det færøske folketingsmedlem har statsministeren ikke flertal i folketinget“.

Eg fari at heita á Sosialin at prenta alla greinina hjá Søe, tí hann nevnir í henni fleiri áhugaverdar spurningar, eisini viðvíkjandi Grønlandi.

Vit føroyingar eru at meta sum fólk við ongum viðurkendum tjóðskapi. Danska harrafólkið sigur nei, harvið verður tað.

10. desember í 1948 - sama ár sum føroyingar í heimastýrislógini verða skírdir „folkesamfund“- verður yvirlýsingin um mannarættindi kunngjørd. Grein 15 ljóðar soleiðis:
(1) Everyone has the right to a nationality (Øll hava tjóðskaparrætt).
(2) No one shall be arbitrarily deprived of his nationality nor denied the right to change his nationality (Eingin skal tilvildarliga missa sín tjóðskap og ongum skal verða sýtt fyri at skifta tjóðskap).

Men sig, hvat ger tingið? Jú, teir skifta tak!

Pól Jespersen

# Helveg Petersen nu koloniherre over Færøerne

Nødvendigt med højesteretsdom om Færøernes stilling i riget efter udenrigsministerens indgreb mod færingernes demokratisk valgte regering i FN

Statsministerens skalten og valten med det færøske folk har smittet af på udenrigsminister Niels Helveg Petersen. Udenrigsministeren har grebet ind mod Færøerne i FN. Færøernes regeringschef, valgt af et lovligt flertal i et lovligt parlament, har end ikke ret til at stille FN et spørgsmål. Udenrigsministeren har stoppet den færøske henvendelse. Med eet slag er Færøerne gjort til en koloni, skønt Danmark netop med den gældende grundlov fra 1953 prøvede at komme ud af sin stilling som koloniherre. Niels Helveg Petersen har gjort sig til koloniherre i Atlanten.

Færøernes landsstyre har med et lagtings-flertal, der er stærkere end den danske regerings i folketinget, henvendt sig til FN med et rent teknisk spørgsmål. det handler om, hvordan FNs regler for forhandlinger mellem landene er. Færingerne har end ikke bedt om en politisk stillingtagen, men vil kende reglerne mellem staterne.

Henvendelsen skyldes selvsagt, at den danske statsminister, der har Færøerne som sagområde i sit ministerium, har gjort sig til bydreng for mindretallet i det færøske lagting, hvor hans egne socialdemokratiske fæller hører til. Hver time af regeringens levetid er den danske regering afhængig af netop de færøske socialdemokrater, for uden det færøske folketingsmedlem har statsministeren ikke flertal i folketinget.

Nyrup Rasmussen, i forvejen ramt af sin skandaløse omgang med færingerne, da de blev kastet ud if økonomisk krise, er det menneske, der har skabt det nuværende flertal på Færøerne for øget færøsk selvstændighed i forhold til Danmark. Havde Nyrup Rasmussen ikke krænket færingerne - og siden prøvet at betale sig ud af det med skatteyderpenge i milliard-størrelse - havde der næppe i dag været selvstyre-flertal på Færøerne. De sidste oprørsstemmer på Færøerne blev fremkaldt af den danske statsministers optræden i hele spillet omkring øerne, Den danske Bank og det færøske pengevæsen.

Statsministeren, skønt aldeles ikke uvildig, er dansk leder af drøftelserne om færøsk selvstyre og har til nu ikke haft andet at byde på end taktisk spil uden rigeste indsigt i folkelighed, hvad man da også hele tiden kan høre på hans taler. Han tør slet ikke bruge ordet folk. Han siger hele tiden mennesker - som om der ikke findes fællesskaber på jorden, men kun enkeltpersoner. Et folk er for Nyrup Rasmussen de fælles mennesker - lige som han taler om den fælles valuta.

Udenrigsminister Niels Helveg Petersen er nu gået i statsministerens fælde. Udenrigsministeren hævder ifølge TV2s tekst-tv, at Færøerne slet ikke har ret „til at træde frem på folkeretsligt niveau uden tilladelse fra Danmarks regering“.

Udenrigsministeren gør sig dermed til koloniherre over Færøerne. Det er en bombe under rigsfællesskabet, og det er svært at se, hvordan de efterhånden mange modstridende synspunkter på Grønlands og Færøernes stilling i riget kan trives ved siden af hinanden. Det bliver nødvendigt med en sag ved højesteret for at få dom for, hvad der lovtilstanden i rigsfællesskabet. Det lyder måske som et urimeligt krav, men man skal huske, at de nuværende regerings-partier som de første nogen sinde har fået højesterets dom for, at de har brudt grundloven. Følgende spørgsmål må klarlægges - nogle af politisk vej, de fleste af juridisk:

1. Nægter Danmark den færøske regering at spørge FN, fordi følge-virkningen af denne selvstændighedshandling vil være, at Grønland så selv kan tage stilling til, om Thule-basen skal kunne bruges til amerikansk stjernekrig? Har den danske regering måske allerede lovet amerikanerne den ny brug af Grønland som base - som den socialdemokratiske statsminister H C Hansens ulovlige ja til atomvåben i Grønland endog uden at spørge grønlænderne, andre partiledere eller nogen i sin egen regering?

2. Har Færøerne kun selvstændighed, når det er i de danske flertals-partiers og regeringens interesse? Hvordan kan Færøerne folkeretligt stå uden for alle folkeafstemninger om EF og EU, når afstemningerne vitterligt er udenrigspolitiske spørgsmål, der handler om afgivelse af Danmarks selvrådheret. Færingerne skal ikke stemme om euroen 28. september, skønt de har den danske krone som fælles valuta med os, og skønt den danske grundlovs ord om kongens ret til at slå mønt overgives til et flertal af udenlandske stater?

3. Hvordan kan Grønland holdes uden for folkeafstemninger om EU, når gældende grundlov fra 1953 lige ud siger, at Grønland er en integreret del af Danmark? De ord kom jo netop ind for at ophæve Grønlands stilling som koloni, fordi det voldte vanskeligheder for Danmark i FN, at Danmark var koloniherre. Hvorfor nægter udenrigsministeren på den baggrund aldeles at udtale sig om stjernekrigs-basen i Grønland, skønt afgørelsen vel alene ligger hos den danske regering og det danske folketing, for indgrebet mod Færøernes selvstændige handling i FN skal vel tolkes sådan?

4. Når Grønlands og Færøernes lovligt valgte demokratiske forsamlinger i virkeligheden kun ses som høvdinge-stammestyre i to danske kolonier uden mulighed for selvstændig handling i forhold til verden, kan lovgrundlaget for disse forsamlinger, hjemmestyre-lovgivningen, så samtidig bruges som grundlag for at tillade de to folk ikke at deltage i rigets grundlovs-påbudte folkeafstemninger, hvor de som integrerede dele af det danske rige afgiver selvrådderet aldeles som danskerne?

5. Skønt det er færingernes og grønlændernes ønske ikke at deltage i folkeafstemningerne, har fritagelsen så et lovligt grundlag? Og vil de ud fra samme grunde kunne undlade at holde folketingsvalg, skønt grundloven siger, der skal vælges to tingfolk både på Færøerne og Grønland.

Hvis færingerne end ikke kan stille FN et teknisk spørgsmål, så er Færøerne en integreret del af Danmark - med grundlovens ord. Hvis færingerne ikke deltager i folkeafstemningerne om suverænitets-afgivelse, så er Færøerne ikke helt og fuldt del af Danmark. Færøerne har altså - må regeringen mene - en mellemstilling. Det er nøjagtigt, hvad man kalder en koloni. Og det understreges af, at koloniherren Danmark udøver ulovlig vilkårlig forvaltning, fordi koloniherren hele tiden selvafgør, hvor megen selvstændighed kolonien kan lige i øjeblikket. Og afgørelsen er hele tiden til koloniherren Danmarks fordel.

Det er skammeligt, at det danske folk med sin ligegyldighed over for de nordatlantiske folks ønske om øget selvstyre skaber mulighed for den danske regering og folketingets flertalspartier til at drive et dobbeltspil, der gør Færøerne og Grønland til bananrepublikker, skønt de to mangler Islands varme kilder til at avle netop den frugt.

Hvordan skal vi dog kunne tro på, at de politikere, der ikke ærligt, åbent og hjælpsomt vil bidrage til andre små folks selvstændighed, netop nu kæmper for dansk selvstændighed i euro-møntunionen? Netop den danske optræden som koloniherre over for Færøerne viser, at i bund og grund har vi her opskriften, som den europæisk union bages efter.

© Poul Erik Søe – Enmandsavisen 26. august 2000